**Fiskirannsóknarstovan**

# Mathøgguslokkur *(Loligo forbesi)* á Føroyabanka

## Royndir gjørdar við "Magnus Heinason" í november 1998

**FRS smárit 99/04**

# Mathøgguslokkur *(Loligo forbesi)* á Føroyabanka

***Fiskirannsóknarstovan, November 1998, Bjarti Thomsen***

## 1. Inngangur

Umframt agnhøgguslokkin *(Todarodes sagittatus)*, sum viðhvørt kemur inn á føroyskar firðir seint á sumri, finst eisini mathøgguslokkurin *(Loligo forbesi)* við Føroyar, mynd 1.
Hann er helst sjáldsamur á landgrunninum, men á Føroyabanka kann hann vera í stórum nøgdum.
Mitt í 1970'unum veiddu skotar upp í 200 tons um árið við Føroyar, mynd 2. Størstu nøgdirnar landaðu teir í oktober-november, mynd 3.
Fiskirannsóknarstovan gjørdi í 1986-91 kanningar av mathøgguslokkinum, sí grein í Fiskirannsóknir nr. 7 (Gaard, 1991). Kanningarnar vóru tiknar uppaftur við einum royndartúri á heysti í 1997 og í okt./nov. 1998 hevur aftur ein túrur verið.
Niðanfyri verður stutt greitt frá høgguslokkinum á Føroyabanka, serliga við atlitið at tí sum er komið burturúr royndunum í 1997 og 1998, men tikið verður afturíaftur niðurstøður frá undanfarnu kanningum.



*Mynd 1. Mathøgguslokkur (Loligo forbesi).*




*Mynd 2. Skotsk veiða av høgguslokki við Føroyar.*




*Mynd 3. Skotsk veiða í meðal hvønn mánaða.*

## 2. Gýting og vøkstur á Føroyabanka

Howard (1979) hevur í árunum 1973-78 kannað høgguslokk, sum skotar veiddu við Føroyar. Hann kemur til hesa ringrás viðvíkjandi gýting, vøkstri og búning: "Íblanding av búnum høgguslokki er størst í apríl og minkar síðan skjótt í mai, sohvørt sum gýtingin fer fram og høgguslokkurin doyr. Nøkur kalldjór síggja út til at liva til næsta árið og kunnu helst gýta einaferð enn. Í mai sæst í veiðuni eisini óbúgvin høgguslokkur (0-group gýtt summari fyri) um 5-6 cm longd (á høgguslokki verður kápulongd máta). Í juli eru 51% av veiðuni óbúgvið og undir 12 cm longd. Ógvuliga fáir ársgamlir høgguslokkar eru hesa tíðina og bara 7% av kvenndjórum eru størri enn 16 cm. Frá juli til november er vøksturin stórur og hesa tíðina vaksa kalldjórini í meðal frá 14.2 cm til 22.9 cm og kvenndjórini frá 12.6 cm til 19.0 cm. Í oktober mennast rognini og um miðan november eru 44% av kvenndjórum búgvin. Við 21 cm longd er 50% av kvenndjórunum búgvin. Í januar eru 87% av kvenndjórum og 60% av kalldjórum búgvin og kalldjór eru nú í meðal 30.9 cm og kvenndjór 21.9 cm"
Kanningarnar 1986-91 (Gaard, 1991) benda eisini á gýting um várið (í mai), men við onkrum undantøkum. Til dømis var í juni 1988 stórur høgguslokkur av báðum kynum og var gýtingin hetta árið helst nakað seinni.

**3. Øki**

At kalla allar royndir eftir mathøgguslokki eru gjørdar á Føroyabanka. Av Føroyabanka til ferskfiskamarknaðin í Scotlandi (Lochinver) eru um 18 tímar sigling (189 fjóringar), mynd 4.




*Mynd 4. Føroyabanki.*

Árini 1986-91 og 97 hevur verið roynt ymsastaðni í kantinum á bankanum og eisini inni á, tó hevur lítið verið roynt í syðra kantinum, mynd 5. Størstu nøgdirnar hava verið í landnyrðingskantinum. Í 1997 var lítið av høgguslokki at fáa og flestu tóv vóru grunt.

Í 1998 varð byrja í landnyrðinskantinum, har høgguslokkur áður er fingin, mynd 6. Roynt var smá tvey døgn (24/10-26/10) í dýpum 170-247 m, tó var eitt tóv inni á 121-144 m. Eftir tilsamans 17 tóv í meðal 126 minuttir varð farið inn at landa í Lochinver. Tá komið var útaftur, var byrja í landsuður-kantinum, har ongin roynd hevur verið áður. Her vóru 11 hál tikin á dýpum 200-280 m. Síðan vóru 3 hál norður gjøgnum kantin og 8 hál á norðara økinum. Síðan var 1 hál á veg suðuryvir aftur og at enda 4 hál á tí syðra økinum, tvs. íalt 27 tóv í meðal 130 minuttir. Eftir góð trý døgn roynd (29/10-1/11) var aftur siglt til Lochinver at landa og síðan beinleiðis á Føroyar.

Á báðum økjum var gott at tóva og ongin trupulleiki av ringum botni ella tílíkum.




*Mynd 5. Tóv á Føroyabanka 1986-91 og 1997.*




*Mynd 6. Tey tvey økini roynt var á í 1998.*

## 4. Reiðskapur

Vanlig botntrol so sum kassatrol og stjørnutrol hava verið nýtt í royndunum eftir hømmuslokki. Eisini lemmar, breitlar og grunnur hava verið riggað sum vanligt og tóvferð hevur verið um 3 míl.

Í royndunum 1986-91 var roynt við 40, 80 og 100 mm meskum. Niðurstøðan var, at 100 mm var ov stór meskavídd, meðan lítil munur var á 40 og 80 mm. Hildið verður tí, at 80-85 mm er hóskandi meskastødd til mathøgguslokkin.

Í 1997 var eisini roynt at seta eina skiljirist í trolið fyri at sleppa undan hjáveiðu av toski, hýsu og øðrum rundum fiski. Hetta tykist at lata seg gera uttan stórvegis trupulleikar.

## 5. Veiða og hjáveiða

Tær eldru royndirnar vístu, at høgguslokkurin var spjaddur um allan bankan í smáum nøgdum niður á umleið 300m dýpi. Bert í landnyrðingskantinum vóru einstøk tóv omanfyri 300 kg/tíma. Royndin í 1998 gav tó nógv meira og veiðan var í meðal um 300 kg/tíma í báðum teimum kannaðu økjunum. Heldur minni var í teimum fáu hálunum, sum vóru tikin ímillum økini.

Býtið av ymiskum fiskasløgum í veiðuni í 1998 er víst í mynd 7. Av hjáveiðu, sum var tikin til høldar, var um helvtin stórur toskur og restin hýsa, longa, upsi, brosma, havtaska, skøta og nakrir kongafiskar. Av hjáveiðu, sum ikki varð tikin, var á tí norðara økinum mest gullaksur, serliga niðanfyri 230 m dýpi. Á tí syðra økinum vóru nøkur stór hál av knurhana og tvey hál við nógvum hýsumurti.




*Mynd 7. Býtið í veiðuni í 1998 í prosent. Markið millum grunt og djúpt er 230 m.*

## 6. Dýpi og tíð á døgni

Frá royndunum í 1986-91 er niðurstøðan, at besta dýpi er 200-280 m og at góð hál av høgguslokki bert fáast um dagin millum kl 0800 og 1500. Roknað verður tí við, at høgguslokkurin helst fer upp frá botni um náttini.

Royndirnar 1998 geva tó nakað ørvísi úrslit. Tær benda á, at besta dýpið er um 190-240m, mynd 8. Í 1998 vóru bestu hál millum kl. 0300 og 1400 og eitt gott hál var eisini á kvøldi um kl 2000, mynd 9.




*Mynd 8. Veiða í mun til dýpi.*




*Mynd 9. Veiða í mun til tíð á døgni.*

## 7. Hagreiðing og søla

Í royndunum 1986-91 varð veiðan av høgguslokki fryst í blokk, men illa gekk at fáa nakaran prís fyri hesa vøru. Í 1997 var roynt at ísa høgguslokkin í kassar við 15-20 kg í hvønn og síðan fáa hann feskan á marknaðin í Fraklandi. Hetta eydnaðist væl og prísurin fyri høgguslokk kom upp í 34 kr/kg. Keyparar løgdu dent á, at høgguslokkurin skuldi ikki vaskast, men goymast í sínum egna blekki. Heldur ikki mátti koyrast ov nógv í hvønn kassa, so høgguslokkurin kom undir ov nógv trýst. Eisini skuldu tóvini helst ikki vera meira enn tveir tímar og túrurin heldur ikki ov langur, tí høggu-slokkur heldur sær verri enn fiskur annars.

Í 1998 varð aftur ísað í kassar um 20-22 kg í hvønn. Tá smærru kassarnir vóru uppi, varð koyrt í 800 litur kør, fyrst ísur, síðan tvær ferðir 100 kg høgguslokk við ísi ímillum og síðan ísur omaná. Tey sístu hálini var eisini ísað leyst á hyllar.

Tann fyrra túrin vóru landað 15.698 kg, harav 9.673 kg høgguslokkur, fyri 367.753 kr brutto, mynd 10. Tann seinna túrin vórðu landað 31.948 kg, harav 16.229 kg høgguslokkur, fyri 712.882 kr. Av tí sum er selt í Fraklandi, verða fluttnings, skilji- og søluútreiðslur um 20% av søluni. Av tí sum er selt í Lochinver verða bert skilji- og søluútreiðslur um 5-10%. Prísurin fyri høgguslokk var 25-26 kr/kg brutto. Støddin á høgguslokkinum var 173 mm og 162 gram í meðal, mynd 11. Keyparar søgdu, at betri prísur kundi fáast fyri høgguslokk, sum var størri enn 300 g/stk. Av tí at høgguslokkur ikki er umfataður av avtaluni við EU verður goldin 6% tollur. Keyparar kennast betri við mathøgguslokk undir navninum *loligo vulgaris*, men kenna tó ikki mun á hesum og *loligo forbesi*.

| Fyrra helvt av túri, roynt í 45 tímar. | | | |
|---|---|---|---|
| **Selt í Fraklandi** | **Kg** | **Kr** | **Kr/kg** |
| Høgguslokkur | 9,673 | 251,605 | 26.01 |
| Upsi | 378 | 4,199 | 11.11 |
| Longa | 334 | 5,284 | 15.82 |
| **Selt í Lochinver** | **Kg** | **Kr** | **Kr/kg** |
| Toskur | 3,300 | 71,190 | 21.57 |
| Hýsa | 1,600 | 27,022 | 16.89 |
| Annað | 413 | 8,454 | 20.49 |
| **Íalt fyrra helvt** | **15,698** | **367,753** | |

| Seinna helvt av túri, roynt í 82 tímar. | | | |
|---|---|---|---|
| **Selt í Fraklandi** | **Kg** | **Kr** | **Kr/kg** |
| Høgguslokkur | 16,229 | 406,357 | 25.04 |
| Toskur | 4,442 | 95,777 | 21.56 |
| Annað | 3,427 | 38,737 | 11.30 |
| **Selt í Lochinver** | **Kg** | **Kr** | **Kr/kg** |
| Toskur | 4,350 | 104,410 | 24.00 |
| Hýsa | 3,075 | 52,274 | 17.00 |
| Havtaska | 425 | 15,328 | 36.06 |
| **Íalt seinna helvt** | **31,948** | **712,882** | |

*Mynd 10. Bruttosøla av veiða frá royndunum 1998.Í umrokningini er nýtt 1FRF=1,13 kr og 1GBP=10,60 kr.*




*Mynd 11. Longd-vekt samband fyri mathøgguslok. Mátaða longdin er longsta longd á kápu.*

## 8. Niðurstøða

Royndirnar higartil hava víst, at mathøgguslokkur er víða um á Føroyabanka. Í støðum og til tíðir kann hesin høgguslokkur verða virðismiklasti partur av veiðuni, um hann verður væl hagreiddur og seldur feskur til matna niður á meginlandi.

## Lesnaður:


*Gaard E., 1991.* Mathøgguslokkurin á Føroya-banka. Fiskirannsóknir nr 7. Fiskirannsóknar-stovan, Tórshavn, 1991.

*Howard F.G., 1979.* Recent trends in the Scottish fishery for Loligo forbesi, together with some notes on the biology of the species. ICES 1979/ K36